# UEFA Coach Education
# Futsal 3´rd Pilot Course




Petur Simonsen & Eli Hentze

# UEFA Coach Education
# Futsal 3´rd Pilot Course

**Formæli**

Undirritaðu umboð fyri Fótbóltssamband Føroya, Petur Simonsen og Eli Hentze, luttóku dagarnar 5.-8.mai 2014 á UEFA-skeiði í Prag um Futsal-venjaraútbúgving.



20 UEFA limalond luttóku á hesum triðja og seinasta sokallaða Pilot-skeiðnum, har endamálið er at kunna limalondini um Futsal B-venjaraútbúgvingina.

Hini limalondini hava luttikið á skeiðum hildin í Spania í februar mánaði 2013 og í Italia í februar mánaði 2014.

Hóast Fótbóltssamband Føroya enn ongar ítøkiligar ætlanir hevur um at skipa fyri serstakari venjaraútbúgving fyri futsalvenjarar, so hevur tað sjálvsagdan týdning at luttaka á skeiðum sum hesum at kunna seg um, hvat hendir á økinum. Eisini við atliti til, hvat framtíðin hevur at bjóða hesum spæli viðvíkjandi. Fótbóltssambandið hevur seinastu tveir vetrarnar skipað fyri futsal-kappingum fyri yngri leikarar. Lítil ivi um, at hesar kappingar fara at halda áfram. Tí er ikki heilt óhugsandi, at tørvur verður á venjaraútbúgving fyri futsal-venjarar í framtíðini annhvørt sum serstak útbúgving ella sum partur av verandi venjartilboði.

Umframt kunningina um B-lisensin fyri futsalvenjarar, so bleiv eisini UEFA Futsal EURO 2014 eftirmett. Venjararnir hjá teimum fýra ½-finalistunum luttóku á skeiðnum og góvu okkum sínar viðmerkingar um kappingina.

Ein rættiliga drúgvur partur av skeiðnum bleiv hildin í stórari innandurahøll í Prag, har m.a. landsliðsvenjararnir hjá Spania, Portugal og Italia høvdu venjingar. Vit tóku eitt sindur upp á video, so um áhugi er fyri at fáa upptøkurnar, eru tit meira enn vælkomin at seta tykkum í samband við Eli Hentze, eli@football.fo

UEFA Coach Education
Futsal 3´rd Pilot Course

**Innihaldsyvirlit**


| | |
|---|---|
| s. 2 | Formæli |
| s. 4-7 | Skráin fyri dagarnar í Prag |
| s. 8-9 | Brot úr søgu og fótbóltssøgu |
| s. 10-12 | Ioan Lupescu um B-lisensin í futsalvenjaraútbúgvingini |
| s. 13-14 | Samanumtøka |

# UEFA Coach Education
# Futsal 3´rd Pilot Course

## Monday 5 May 2014

| | |
|---|---|
| **Morning** | *Arrival of participants* |
| **13:00** | *Lunch at Hotel* |
| **15:30** | **Welcome Message**<br>Rudolf Řepka, FA of Czech Republic, General Secretary<br>Petr Fousek, UEFA Futsal Committee 2nd Vice-Chairman |
| **15:45** | **Introduction**<br>Ioan Lupescu, UEFA Chief Technical Officer |
| **16:00** | **Theory: Futsal Teaching Methods**<br>Jose Venancio Lopez Hierro, Spanish National Team Head Coach |
| **17:00** | Break |
| **17:15** | **Theory: Futsal Knowledge**<br>Javier Lozano Cid, FIFA & UEFA Futsal Study Group member |
| **18:15** | Break |
| **18:30** | **Theory: Tactical Skills**<br>Jose Venancio Lopez Hierro |
| **19:30** | *Close of Session* |
| **20:00** | *Dinner at Hotel* |

# UEFA Coach Education
# Futsal 3´rd Pilot Course

## Tuesday 6 May 2014

| | |
|---|---|
| | *Breakfast* |
| **09:00** | **UEFA Futsal EURO 2014 – A Review**<br>Javier Lozano Cid and Graham Turner<br>with Roberto Menichelli, Sergei Skorovich,<br>Jose Venancio Lopez Hierro and Jorge Braz |
| **10:30** | **Theory: Individual Skills in Game Situations**<br>Roberto Menichelli, Italian National Team Head Coach |
| **11:30** | *Break* |
| **11:45** | *Transfer to Futsal Hall* |
| **11:55** | *Group Photo* |
| **12:00** | **Practical: Futsal Knowledge**<br>Javier Lozano Cid |
| **13:00** | *Transfer to Hotel Olympik* |
| **13:15** | *Lunch at Hotel Olympik* |
| **14:30** | *Transfer to Futsal Hall* |
| **14:45** | **Practical: Systems of Play & Fundamentals of Tactics**<br>Jose Venancio Lopez Hierro |



| | |
|---|---|
| **16:00** | *Break* |
| **16:15** | **Practical: Offensive/Defensive Transitions & Set Pieces**<br>Jose Venancio Lopez Hierro |
| **17:15** | *Break* |
| **17:30** | **Practical: Powerplays**<br>Tomáš Neumann, Czech Republic National Team Head Coach |
| **18:30** | *Transfer to Hotel* |
| **19:30** | **Friendly Futsal Game for Participants** |
| **20:00** | *Transfer to Hotel* |
| **20:30** | *Dinner at Hotel* |

| Wednesday 7 May 2014 | |
|---|---|
| | *Breakfast* |
| **09:00** | **Theory: Managing the Game**<br>Javier Lozano Cid |
| **09:45** | **Theory: Fitness for Futsal**<br>José Luis Mendes, Portuguese National Team Fitness Coach |
| **10:45** | *Break and Transfer to Futsal Hall* |
| **11:15** | **Practical: Warm-ups/Cool downs & Stretching Exercises**<br>José Luis Mendes |
| **12:00** | **Practical: Endurance, Speed, Strength & Coordination Exercises**<br>José Luis Mendes |
| **12:45** | *Transfer to Hotel* |
| **13:00** | *Lunch at Hotel* |
| **14:15** | *Transfer to Futsal Hall* |
| **14:20** | **Practical: Principles of Futsal Goalkeeping**<br>Cesar Arcones, Spanish National Team Goalkeeper Coach |
| **15:30** | *Break* |
| **15:45** | **Practical: Training of Individual Skills in Game Situations**<br>Roberto Menichelli |
| **16:45** | *Break* |
| **17:00** | **Practical: Application of Individual Skills in Game Situations**<br>Roberto Menichelli |
| **18:00** | **Practical: Organising and Managing a Futsal Training Session**<br>Jorge Braz, Portuguese National Team Head Coach |
| **19:00** | *Close of Session and Transfer to Hotel* |
| **20:00** | *Departure to Official Dinner* |
| **20:30** | **Official Dinner**<br>Hosted by the FA of the Czech Republic |

3rd UEFA Pilot Course for Futsal Coach Educat

| Thursday 8 May 2014 | |
|---|---|
| | *Breakfast* |
| **09:00** | **Theory: Leadership** |
| | Javier Lozano Cid |
| **10:00** | *Break* |
| **10:15** | **Discussion Forum – The Future of Futsal Coach Education** |
| | Moderated by Laurent Morel & David Gough |
| **11:30** | **Conclusions & Closing** |
| **12:00** | *Close of Course* |
| | |
| **Afternoon** | *Departure of participants* |

*Mánadagur 5.mai - hósdag 8.mai 2014, Prag*

Tíverri var ongin fríløta hesar dagarnar at hyggja seg um í kekkiska høvuðsstaðnum, ið hýsir góðar 1.2 milliónir íbúgvar. Men her við sera fáum orðum nakað um Kekkia og um fótbóltssøgu teirra




Kekkia, fyrr nevnt Bøhmen, verður til móti endanum av 9.øld fyrst sum lítið fúrstadømi runt býin Prag.

Eftir fyrra heimsbardaga lýstu kekkisku londini Kekkia og Slovaka seg sum tjóðveldið Kekkoslovakia.

Móti endanum av seinna heimsbardaga koyra sovjetisku stríðsvognarnir inn í landið og loysa borgarnar úr týsku klørnum.

Í 1968 er VÁRIÐ komið til Prag, men uppreisturin móti kommunistisku leiðsluni verður bardur niður.

Í 1989 fella kommunistisku múrarnir eystanfyri. Í 1993 fara Kekkia og Slovakia hvør til sítt og gerast tvey sjálvstøðug ríki.

Kekkoslovakia hevur spælt ein týðandi leiklut í fótbóltssøguni. Í 1934 var HM-endaspælið leikt í Italia, har Mussolini ráddi fyri borgum. Tá ið bert 10 minuttir restaðu av finaludystinum vóru heimamenninir aftanfyri 0-1, men tvey italsk mál móti endanum syrgdu fyri italskum gulli, meðan kekkoslovakar máttu taka til takkar við silvuri.

Í 1962 var Kili vertur fyri HM-endaspælinum. Aftur hesaferð máttu eysturevropeararnir siga takk fyri silvurheiðursmerkini, meðan Garrinchia og hinir brasiliumenninir hildu HM-steypinum upp í loft aðru ferð á rað.

Í EM-endaspølum hevur Kekkoslovakia eisini góð úrslit at vísa á. Gull í 1976 og bronsu í 1980.



Fótbóltsáhugaði minnast nokk best serstaka brotssparkið hjá Antonin Panenka í EM-finaluni móti Vesturtýsklandi í 1976. Eftir longda leiktíð stóð enn á jøvnum 2-2 og tískil mátti farast undir brotssparkskapping.

Panenka var fimti og seinasti skjúttin. Støðan var 4-3 til Kekkoslovakia. Vesturtýski málverjin, Sepp Maier, kastaði seg til sína vinstru síðu, meðan Panenka kippaði bóltin mitt í málið. Heimurin hevði fyri fyrstu ferð sæð eitt brotsspark, ið var heilt øðrvísi enn onnur. Seinni hava Zidané, Pirlo og aðrar stjørnur hermt eftir honum í avgerandi dystum.

Høvuðspersónurin greiðir soleiðis frá:

*-Nobody had ever taken a penalty like that before. I came up with the idea because I used to practice penalties after training at Bohemians with our goalkeeper. To make it interesting, we used to wager a beer or a bar of chocolate on each penalty. Unfortunately, because he was such a good keeper, I ended up losing money as he kept saving more shots than I could score. As a result I ended up lying awake at night thinking about how I could get the upper hand. I eventually realised that the goalkeeper always waits until just before the last moment to try and anticipate where the ball is going and dives just before it's kicked so he can reach the shot in time. I decided that it was probably easier to score by feinting to shoot and then just gently tapping the ball into the middle of the goal. In this way the keeper had always dived by the time the ball was kicked and had no chance of recovering in time to save the shot. I tried it out on the training ground and it worked like a charm. The only problem was that I started getting a lot fatter because I won back all those beers and chocolates."*

https://www.youtube.com/watch?v=Tp2HZNheCZ8

Í 1996 var Kekkia í EM-finaluni móti Týsklandi, men mátti enn einaferð taka til takkar við silvuri, tá ið Oliver Bierhof skoraði sokallað Golden Goal mál í longdari leiktíð til úrslitið 2-1.

# UEFA Coach Education
# Futsal 3´rd Pilot Course

**Ioan Lupescu um futsal-venjaraútbúgvingna**



Eftir at umboð fyri kekkiska fótbóltssambandið hevði boðið luttakandi londunum vælkomnum til Prag, tók UEFA Chief Technical Officer Ioan Lupescu yvir og greiddi frá arbeiðnum higartil við at seta á stovn eina B-venjaraútbúgving fyri futsalvenjarar og hvussu langt ymisku limalondini vóru komin í royndum teirra at innføra útbúgvingina.

UEFA venjaraútbúgvingin er sett saman av nógvum ymiskum pørtum, sum vit síggja á hesi myndini:




Høvuðsparturin er fótbóltsvenjaraútbúgvingin, sum vit kenna hana við B, A og Pro-lisensi. Hesi síðstu árini eru so nøkur serstøk skeið komin afturat – Specialist Diploma: B-futsal, málverju og A-ungdómselituvenjaraútbúgving.

Serstaka B-futsalvenjaraútbúgvingin telur 123 tímar, og innihaldið er hetta:

## New UEFA Futsal B Diploma Guidelines

UEFA Futsal B Diploma Guidelines

| Futsal B Diploma - Basic Coach Award | |
|---|---|
| | Duration |
| **A. THEORY UNITS** | **minimum 46 hrs** |
| **1. Futsal Knowledge** | **6hrs** |
| Reading the Game (basic) | 2hrs |
| Match Analysis Guidelines | 2hrs |
| Player Development Phases | 2hrs |
| **2. Leadership/Management** | **10hrs** |
| The Role of the Coach (e.g. aims) | |
| Leadership Principles | |
| Planning (e.g. Training sessions) | |
| Developing Players | |
| **3. Futsal Physiology/Futsal Medicine** | **10hrs** |
| First Aid | |
| Fundaments of Diet/Fluid Intake | |
| Principles of Fitness Training (youth and adult) | |
| Player Physiology | |
| Child and Youth Development (physical and psychological) | |
| Anti-doping Education | |
| **4. Teaching Methods** | **12hrs** |
| Principles of Teaching (e.g. feedback) | 2hrs |
| Organising Practices and Games | 3hrs |
| Designing Tasks | 3hrs |
| Coaching Styles | 2hrs |
| Do's and Don'ts of Coaching | 2hrs |
| **5. Futsal Laws of the Game** | **8hrs** |
| Role of the Referee | |
| The 17 Laws | |
| Fair Play Principles | |

## New UEFA Futsal B Diploma Guidelines

| B. PRACTICAL UNITS | minimum 74 hours |
|---|---|
| **1. Technical/Tactical Futsal** | **46 hours** |
| Introduction to Tactics | 2hrs |
| Tactics in Futsal | 6hrs |
| The principles of Futsal (basic individual tactics) | 6hrs |
| Application of Technical Skills During a Game | 10hrs |
| Team Tactics | 8hrs |
| Systems of Play | 8hrs |
| Set-pieces | 4hrs |
| Principles of Goalkeeping | 2hrs |
| **2. Physical Preparation and Injury Prevention for Futsal Players** | **16 hours** |
| Warm-ups/Cool-downs/Stretching | 4hrs |
| Basic Endurance Training | 2hrs |
| Basic Speed/Speed Endrance | 2hrs |
| Flexibility | 2hrs |
| Strength | 2hrs |
| Coordination | 2hrs |
| Recovery | 2hrs |
| **3. Teaching Practice** | **12 hours** |
| Organising and Managing a Training Session | 8hrs |
| Making Technical/Tactical Decisions During a Game | 4hrs |
| **C. ASSESSMENTS/EXAMINATIONS** | **3hrs per person** |
| **1. Practical Coaching Assignment** | **1hr** |
| Evaluation / Examination | |
| **2. Theory** | **1hr** |
| Evaluation / Examination | |
| **3. Laws of the Game** | **1hr** |
| Evaluation / Examination | |
| **Total Hours** | **minimum 123 hours** |

Ein av høvuðsorsøkunum til, at UEFA tekur Futsal undir sítt veingjabreiðið, er allarhelst hon, at felagsskapurin so ella so sær spælið sum ein kappingarneyta til vanliga fótbóltsspælið og vil tí vera við til at stýra gongdini.

Futsal hevur vaksandi undirtøku runt um í Evropa. Sum nevnt áður hava vit her heima eisin tveir teir seinastu vetrarnar sæð eina vaksandi undirtøku fyri spælinum, tá ið aktiviteturin uttandura er minni.

Men sum nevnt áður, so er ikki nærliggjandi at hugsa sær, at grundarlag er fyri serstakari Futsal-venjaraútbúgving her og nú. Tað er tó meiri sannlíkt, at Futsal kann gerast ein partur av okkara núverandi B-útbúgving. Hetta var eisini nakað, ið fleiri onnur limalond bóru upp á mál dagarnar í Prag.

UEFA spurdi øll limalondini á ráðstevnu í Budapest í fjørheyst, hvør støða teirra er til serstaka Futsal-venjaraútbúgving. Svarini vóru hesi:




Føroyska svarið er at finna millum tey 35%, sum svaraðu, at áhugi er fyri hesum einaferð í framtíðini.

UEFA Coach Education
Futsal 3´rd Pilot Course

**Samanumtøka**

Sum vitiligt er, vóru nógvar viðkomandi og áhugaverdar framløgur á skránni. Til ber at síggja allar framløgurnar á heimasíðuni hjá FSF, www.fsf.fo

Men eisini nógvir tímar við venjing. Talan var um nakrar av teimum dugnaligastu futsal-venjarunum í Evropa, bleiv sagt. Fleiri av venjingunum vóru tó ikki so ólíkar teimum, vit kenna frá uttandurafótbóltsvenjing.

Frálæruhátturin var í flestum førum sera nógv prát, tá ið øvilsi vórðu sett í gongd. Eftir okkara tykki alt ov nógv! Vit vildu heldur nýtt frálæruháttin at vísa-forklára-vísa.

Sæð við føroyskum eygum er futsal eitt gott og kærkomið íkast til at gera fótbóltsspælið til eina heilársítróttargrein. Futsalspælið gevur eisini leikarunum møguleikan at menna nøkur amboð, ið brúk eru fyri í royndunum at gerast góður fótbóltsleikari. Vit hava tosað um, at futsal betrar um teknikkin.

Spanski Javier Lozano Cid tosaði um *perception and decisionmaking* - at hyggja upp áðrenn móttøku og taka avgerðir um, hvat gerast skal – sum nakað, ið leikararnir læra við at spæla futsal og síðani brúka í fótbóltsspælinum uttandura.

Javier Lozano Cid nevndi fleiri ferðir hesar dagarnar í Prag, at perseptión er fyrsta og týdningarmesta stigi. Og í tí samanhanginum er *bodyposition* grundleggjandi. Kunnu vit við futsalspælinum betra um júst henda partin, so er nógv vunnið, tí føroyski fótbóltsleikarin má betra henda førleikan munandi, um tað skal eydnast okkum at menna spælið enn meira.

Í mest framkomna fótbóltslandinum í heiminum, Brasilia, er futsal ein týðandi partur av menningini. Allar tær stóru stjørnurnar hava leikt futsal. HM-toppskjúttin Ronaldo sigur soleiðis um futsal:

-“I think all the players should initiate football through FUTSAL, the basic fundamental skills that I learned, absolutely all of them were based in FUTSAL”.

http://www.fifa.com/futsalworldcup/news/newsid=1798909/

http://news.bbc.co.uk/sport2/hi/football/skills/7143587.stm

UEFA Coach Education
Futsal 3´rd Pilot Course

Inni á www.uefa.com er rættiliga nógv tilfar at heinta. M.a. ber til at lesa frágreiðingina frá UEFA Futsal Euro 2014,

http://www.uefa.com/MultimediaFiles/Download/Publications/uefaorg/General/02/09/53/61/2095361_DOWNLOAD.pdf

Um áhugi er fyri at vita meira um skeiðið ella fáa tilfar, sum nevnt áður, eru tit altíð meira enn vælkomin at venda tykkum til Eli Hentze, eli@football.fo

Vinarliga




*Petur Simonsen*

&

*Eli Hentze*

